


Óli Hammer, stjóri: — Hvønn leiklut eg skal hava í Smyril Line í framtíðini, fari eg at lata partaeigararnar taka stoðu til.

Óli Hammer:

Nevndin skal taka støðu til leiklut mín

— Sigur Óli Hammer í samrøðu við Sosialin.

Nakrir danir, sum arbeiddu umborð á Norrona, fóru til fakfelagið »Sømændenes Forbund« og ákærdu Smyril Line fyri óregluliga viðferð. Eftir tølunum, sum SF roknaði út, so fingu deksmenn í meðal bert 34 krónur um tíman. Manningin arbeiddi umframt hetta í upp til 40 tímar út í eitt, eins og teir ikki fingu fritíðarlon ella fri, eftir teimum reglum, sum eru galdandi í Danmark. Norrona varð eftir Sømændenes Forbund ákærd fyri at »sigla undir panamaflaggi« í Danmark. Teir søgdu, at tryggleikin fyri ferðafolk og manning var í vanda. Politimeistarin í Korsør, sum fekk ákæruna frá Sømændenes Forbund, vildi ikki viðgera málið. Hann vísti til Dansk Skibstilsyn. Her varð upplýst, at Norrona eftir teknisku fyriskriftunum var í lagi, men at manningarspurningurin var føroyskt sermál, sum ikki hoyrdi undir stovnin.

Eingin harragarður

Oli Jacobsen, formaður í Føroya Fiskimannafelag, hevur sáttmálan hjá farmasiglingini um hendir. Eisini Norrona og manningin hoyrir undir henda sáttmála. — Viðurskiftini hjá donum í farmasiglingini eru øðrvísi enn okkara, av tí at hesin partur í farmasiglingini har, er ein pressionsbólkur, sum eftir einum degi kann leggja ferðamannaskip lamið. Tí hevur Sømændenes Forbund serliga goðan sáttmála fyri sini folk umborð á ferjunum. Føroya Fiskimannafelag fekk á fyrsta sinni sáttmála fyri farmasiglingina í 1981. Hetta var gjørt einamest fyri at gera munin millum hægst- og lægstlønt minni í hesum yrki. Tá var dagløn 270 krónur. Hóast vit ikki kunnu siga, at lønin hjá sjófolki er nakar harragarður, so er veruleikin tann, at vit frá 1. januar fáa eina dagløn til støddar 500—600 krónur. Hóast tølini ikki eru so stor, so progva tey kortini, at viðurskiftini í dag eru nógv betri enn áður.

Viðvikjandi yvirarbeið og fritíð, so havi eg ikki fingið nakra klagu um hetta. Eg havi eisini sæð arbeiðsseðlarnar, og har hevur einki óregluligt verið, mær vitandi, sigur Oli Jacobsen.

Dagny Joensen

Lars Carstensen går til konkurrenten

KORSØR: Det færøske rederiforetagende *Smyril Line*, der den 14. oktober indsatte færgen *Norröna* i daglig trafik mellem Korsør og Kiel, har ansat *Lars Carstensen* (40) som direktør pr. 1. november.

Lars Carstensen kommer fra Gedser-Travemünde Ruten, hvor han har virket i flere år.



Lars Carstensen.

Eitt danskt grannskoðarafelag gjordi framtíðarútlit fyri siglingina Korsor—Kiel rutuna fyri Smyril Line. Besti solustjórin innan yrkisgreinina tók av tilboði sum ferðamannaleiðari í Korsor. Hvorki framtíðarútlitini ella stjórin hjá kappingarneytanum Gedser— Travemünde rutuni, botti um stoðuna hjá Norrönu.

At enda settu vit Óla Hammer, stjóra á Smyril Line nakrar spurningar, sum umroddir verða í greinini.

Hvi varð Korsør-Kiel rutan niðurløgd eftir einum degi?

— Tað var fyri at bøta um hallið hjá felagnum. Vit sóu, at har vóru ikki møguleikar at leiga Teistan og seta inn í rutuna, meðan Norrona rokti summarsiglingina í summarhálvuni.

— Hvi varð Lars Cartensen koyrdur so brádliga?

— Tað vil eg helst ikki úttala meg um, men kortini, so kann eg siga, at tær vónir, sum vit settu til hansara know-how í Eystursjóvarsiglingini, góvu ikki væntaða úrslitið.

— Í donskum blaðum stóð at lesa, at tit høvdu latið eina millión fyri at fáa Lars Cartensen at arbeiða fyri tykkum?

— Tað er heilt burturvið, og hevur einki við veruleikan at gera. Vit bjóðaðu honum góða løn og vónaðu, at hon fór at koma aftur margfaldað, tí hann hevði innlit í viðurskiftunum.

— Hvussu nógv fekk Lars Cartensen í árslon?

— Nú var hann ikki eitt ár í arbeiði okkara, men umleið 500.000 túsund krónur tilsamans, mundi hann fáa.

— Hann saksøkti Smyril Line fyri 800.000 túsund tí hann hevði tvey ára sáttmála við tykkum?

— Lars Cartensen eins og hini 10 fólkini, sum vóru í starvi hjá okkum í Korsør, fingu triggjar mánaða lon, tá tey vóru uppsøgd.

— Lars Cartensen fekk 196.450 krónur við forlik. Er tað lon fyri triggjar mánaðir, so hevur mánaðarlønin verið størri?

— Hetta er fyri lon í mai mánaði og 3 mánaða uppsogn og fritíðarlon.

— Fólk gramdu seg um, at vøran um borð á Norronu var so dýr?

— Í prisum vóru vit kappingarforir við hini ferðamannaskipini. Vit keyptu vørur, har hon var ódýrast, so tað hevur helst bert verið einstakar vørur, ið talan hevur verið um.

— Tit skyldaðu 7,5 mill. krónur til BLOR-fyritøkuna, tá Korsør-Kiel rutan varð niðurløgd. Er tað haldgott prógv fyri, at tit hava havt møguleikar at keypa aðrastaðni?

— BLOR fyritøkan var høvuðsútgerðarfelag okkara um borð á Norronu, men ikki eina-útgerðarfelag. Vit keyptu vørur aðrastaðni í Danmark og í Føroyum eisini.

— So stór skuld er ikki júst besta støði at tingast um prísir og rabattskipanir?

— Smyril Line hevur síðan vit byrjaðu virksemið givið vørusøluna út í lisitatión til ymsu shipping—fyritøkurnar í Danmark, eins og fyri ein part í Føroyum. Veruleikin er bert tann, at BLOR fyritøkan gav besta tilboðið. At vit so komu í so stóra skuld til fyritøkuna, er ein annar spurningur, sum vit nú hava fingið avtalu um at gjalda aftur.

— BLOR fór á húsagang, og er nú yvirtikin av Amagerbankanum. Er tað tí Smyril Line ikki rindaði skuldina?

— Tað er rætt, at BLOR fyritøkan kom í figgjarligar trupulleikar í vár, men hon fór ikki á húsagang. Ein broyting í nevndini í fyritøkuni fór fram, har Amagerbankin keypti partabrøv, og hervið fekk innivist í nevndini fyri BLOR.

— Tað er sagt, at eingin roknskapur er fyri Korsør-Kiel rutuna. Er tað satt?

— Nei, tað er ikki satt. Men kortini vil eg viðganga, at Smyril Line hevði stórar trupulleikar við at fáa roknskapin skipaðan í byrjanini. Av tí at høvuðsdeildin var í Korsør og roknskapardeildin í Føroyum, so var tað eitt tíðarskeið, áðrenn bókingar og roknskapur varð samskipað. Hetta er nú fingið í rættlag, eftir at vit hava fingið sakkona arbeiðsmegi til hetta arbeiðið.

— Er tað satt, at mongdin av partabrøvunum gav persónum nevndarsess í Smyril Line?

— Eftir kapitalistisku skipanini ber tað til at keypa sær ein nevndarsess. Í veruleikanum vóru tað vit, sum stovnaðu felagið, ið komu í fyrstu nevndina. Sostatt vóru tað eisini vit, sum fingu nevndarsessirnar.

— Er tað ikki óvanligt, at stjórin í einum partafelag situr í nevndini?

— Eg veit ikki, hvussu føroyska partafelagslógin er skipað, men t. d. í Bretlandi hava teir góð úrslit av at nevndin er mannað við stjórum og leiðarum innan eina fyritøku.

— Lýstar ferðaætlanir, sum ikki hildu, Kiel—Korsør rutan, sum varð niðurløgd. Bussferðir, ið ikki komu til bilagda landið o. s. fr. Var grundarlagið haldgott hjá Smyril Line?

— Eg veit væl, at nógvir skeivleikar hava verið í byrjanini av hesum tiltakinum. Tað er tó ikki so ónatúrligt, tá tú roynir nakað nýtt.

— Eg kann kortini siga, at hava tað verið skeivleikar, so hava vit rættað teir, so skjótt sum gjørligt, og eisini at vit nú meta, at ljós er fyri framman, at Smyril Line kann gerast ein lønandi vinna.

— Vit noydast tó at ásanna, at figgjarliga grundarlagið var ov veikt í byrjanini, og at tað førdi við sær, at tað var so trupult at arbeiða fyritøkuna upp.

— Vit hava nú fingið skipaðar umstøður at arbeiða undir, góð serkon fólk at gera arbeiðið, og tí skuldu møguleikarnir verða til staðar at Smyril Line kann bera seg frameftir. Viðvikjandi ferðaætlanini, so hava vit fingið eina søludeild og stjóra, sum er kønur á hesum øki. Hann kemur frá kenda ferðamannafelagnum Thinggaard í Álborg, sum vit komandi summar fara at samstarva við.

Í løtuni arbeiða vit fyri at leggja til rættis summarferðirnar, sum komandi summar fara at verða til somu lond sum í ár, umframt bussferðir o. a., sum kemur afturat.

— Tú hevur orlov frá starvinum í Strandferðsluni. Hvørjar framtíðarætlanir hevur tú?

— Eg havi orlov hetta árið út, og havi sostatt starv í Strandferðsluni, sum eg kann fara aftur til. Hvørt hetta verður veruleiki, veit eg ikki. Fyribils fari eg at vita, hvat partafelagið ger av á aðalfundinum.

— Tú ert koyrdur sum nevndarlimur og stjóri á Smyril Line?

— Nei, tað eri eg fyri sovitt ikki. Í viðmerking til orðaskiftið á Tingi, var samtykt, at stjórin í fyritøkuni ikki skuldi vera í nevndini. Á sama orðaskifti var sagt, at ánarnir skulu taka støðu til stjórnarviðurskiftini, í felagnum. Á eykaaðalfundinum skal nevndin broytast frá fimm til sjey limir, harav felagið skal velja tveir limir — afturat teimum, sum politisku flokkarnir hava valt.

— Nýggja nevndin skal sostatt taka støðu til tin leiklut í Smyril Line í framtíðini?

— Eg taki ið hvussu so er ikki stoðu, fyrr enn aðaðfundurin hevur verið, sigur Óli Hammer og skoytir uppí: — Tá nevndin í Smyril Line skuldi skipa seg á fyrsta sinni, var eg biðin um at verða nevndarlimur. Eg hugsaði tá sum so, at høvdu fólk álit á mær, so kundi eg ikki vísa teimum aftur, tí eg var tó ein av stovnarunum.

Ætlanin var, at so hvørt sum fráleið, og viðurskiftini komu í rættlag, so skuldi eg gevast í nevndini.

— Tá siglingin Korsør-Kiel var einasta loysn, um skipið skuldi ikki leggjast fyri teym, helt eg, at støðan var so vánalig, at eg kundi ikki siga meg burtur úr nevndini.

— Stjóri ella nevndarlimur í framtíðini?

— Partaeigararnir í Smyril Line fara at gera av, hvar eg frameftir skal leggja arbeiðsorku mína, sigur Óli Hammer.

Lýst er til eykaaðalfund 9. oktober. Nevndin verður viðkað við tveimum limum upp í sjey limir, harav Smyril Line skal velja tveir. So fer nýggja nevndin til verka.

Dagny Joensen